## DAGSINS MEINING

# Vinnuhúsið og framtíðin

Í ársfrágreiðingini fyri 2000 tosar Vinnuhúsið um framtíðarútlit innan "fiksi"-vinnuna. Um hetta skal skiljast sum ein viðmerking til at Fólkaflokkurin umsitur fiskivinnumál í Tinganesi, skulu vit lata verða ósagt, men rámandi fyri fiskivinnupolitikkin er tað í hvussu so er. Hví kemur eingin beinleiðis viðmerking til okkara fiskivinnupolitikk frá Vinnuhúsinum? Vinnupolitikkur og fiskivinnupolitikkur kunnu ikki skiljast frá hvørjum øðrum, og tí eigur ein orðaður vinnupolitkkur at verða galdandi fyri alla vinnu. Hvat heldur Vinnuhúsið um marknaðarbúskap í fiskivinnuni á sjógvi? Hvat heldur Vinnuhúsið um skattalættan til sjófólkið, ið er ein rakstrarstuðul til reiðaríini, sum skeiklar vinnumynstrið og leggur trýst a lønirnar á landi?

Av Vinnuhúsinum nógv rósti vinnupolitikkurin, ið var orðaður í 1999 hevur ikki nógv uppá seg, tí hann er so generelt orðaður, at so at siga eitt og hvørt politiskt initiativ kann skákast inn undir henda politikk. Orðingarnar bera brá av at verða tiknar úr lærubókum innan organisatiónsteori og netverksteori, uttan stórvegis viðgerð. Sjálvandi er tað rætt, at "fjøltáttað samskifti er ein fortreyt fyri menning", og at krøv um nýhugsan eru til vinnuna, men hvat merkir hetta reint praktiskt? Trupulleikin við so generellum og sjálvfylgiligum orðingum er, at vinnupolitikkurin reint faktiskt ikki víkir frá tí, ið hevur verið vinnupolitikkur tey seinastu tíggjuárini, nevniliga, at landið skal skapa karmar, ið eru mennandi og stimbrandi fyri føroyska vinnu. Gamaní er ringt at finna gomul vinnupolitisk stevnumið á internetinum, men bert tað, at tey ikki eru á internetinum, merkir ikki, at tey ikki eru til.

Leysar orðingar um at lata marknaðarkreftirnar ráða verða dagliga punkteraðar av ásannanini av, at marknaðarkreftirnar ikki megna at fremja nýggjar vinnur uttan landsins hjálp. Hvar hevði ferðavinnan verið í dag, um landið ikki í 1975 og aftur í 1983-84 var við at leggja lunnar undir ferðavinnuna? Kanska Vinnuhúsið ger tað ómøguliga, og finnur eitt G8 land, ið ikki hevur almennar stuðulsskipanir av onkrum slagi. Hví man tað verða so? Vita G8 londini ikki betri? Kann tað hugsast, at Vinnuhúsið hevur gloymt, at eins og kommunisman, so virkar tann fríi marknaðurin uttan almenna regulering bert í teori og ikki í praksis.

Vinnuhúsið fortelur eisini, at bert vinnuframaskipanir, ið vinnuni tørvar, skulu verða settar í verk. Veit vinnan altíð hvørjar vinnuframaskipanir, henni tørvar? Tað er vert at bíta merki í, at grundleggjandi broytingarnar fyrst í 90'unum innan alivinnu og vinnu annars við avtøku av skaðiligum stuðulsskipanum o.ø. vóru gjørdar, ikki eftir tilráðing frá vinnuni, men politiskt. Søguliga síggja vit, at vinnan hevur dugað sera illa at sæð fram í tíðina, og tíverri sær tað sama út til at gera seg galdandi í dag, har vit bert fáa at vita, at núverandi vinnupolitiska kós skal haldast. Álvaratos, væntar vinnan ein Marxistiskan búskap ella hvat?

Tað er eitt sjúkutekin, at vinnan ikki sjálv kemur við tilmælum um t.d. at kanna eftir, um skipanin við skiftisøkjum í alivinnuni verður brúkt, sum hon skal. Hvat sigur tað um eina vinnu, at hon ikki kundi gera eina verjuætlan móti ILA fyri eina hálva millión, uttan landið mátti veita studning. Er hetta ein vinna, ið dugir at líta frameftir? Er hetta ein vinna, ið verður væl stýrd? Tað skal verða okkara vón, at eitt kjak á einum praktiskum støði uttan flosklar um vinnu kontra tað almenna verður tikið upp í samband við alla vinnu, bæði á sjógvi og landi undir einum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Framhaldandi í Ríkisfelagsskapi

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



*Tá málið um avtøku av donsku hernaðarlógunum, ið Torbjørn Jacobsen hevði lagt fram, fekk fyrstu viðgerð á fólkatingi í mei mánaða, var yvirhøvur breið semja millum framsøgu-fólkini í teim ymisku flokkunum, at hent var eitt óheppið mistak*

Men annars fekk Torbjørn Jacobsen ikki stóra undirtøku millum aðrar í sínum vanliga brigsli móti donskum politikarum og donsku stjórnini.

Sligið varð tó fast, at handfaringin av málinum átti at verið øðrvísi, og at fleiri misskiljingar vóru hendar á vegnum. Eisini bleiv staðfest fleiri ferðir, at málið bert var galdandi fyri danskar hermenn í Føroyum.

Hetta er ikki rættiliga komið fram undir viðgerðini av málinum, og nógv eru tey, ið ikki vistu at so var. Men bæði løgmaður og landsstýrismaðurin við lógarmálum hava sjálvandi vitað tað. Er tað tá løgið, um onkur spyr, hví júst tann upplýsingin als ikki er tikin uppá tungu frá føroyskari síðu?

**Hvussu ber tað til?**
Sum umboð fyri Sambandsflokkin atkvøddi undirritaða fyri uppskotinum á fólkatingi, av tí at eitt prinsipp var brotið, og sostatt hevði Sambandsflokkurin somu støðu sum herheima, tá uppskotið var viðgjørt á Føroya løgtingi.

Men eg vil eisini leggja dent á, at tað var rætta avgerðin, tá flokkurin valdi fyrst av øllum at kanna málið nærri, áðrenn vit tóku støðu, og tí vóru vit ikki millum teir flokkar, sum settu uppskotið fram á løgtingi.

**Nevndarviðgerðin**
Fyri at ongin misskiljing skal verða, skal eg her endurgeva mínar viðmerkingar í álitinum, sum nevndin (Politisk Økonomisk Udvalg), har eg eri limur, lat úr hondum:

*"Lisbeth L. Petersen bemærker, at for Sambandspartiet er det helt grundlæggende, at ingen rigslov skal sættes i kraft på Færøerne uden at den først er forelagt Lagtinget. Ved de forudgående forhandlinger om hjemmestyrelovens indhold var dette et vigtigt anliggende for Sambandspartiet. Sambandspartiet lægger stor vægt på, at dette princip respekteres.*

*Den gamle praksis med, at rigslove skal forelægges hjemmestyret til betænkning, har normalt ikke voldt problemer. At denne praksis nu er brudt for 2. gang er meget beklageligt.*

*Mindretallet kan ikke tilslutte sig motivationen for beslutningsforslaget. Hjemmestyreloven er for mindretallet ikke kun jura, men en politisk aftale.*

*Når forslagsstilleren siger, at landsstyret ikke havde kendskab til lovforslagene, er dette heller ikke korrekt. Af korrespondencen mellem den danske forsvarsminister og lagmanden på Færøerne fremgår det, at lagmanden var vidende om de love og bekendtgørelser, der var behov for at kundgøre på Færøerne. Men det er en kendsgerning, at Lagtinget ikke var informeret.*

*Det centrale princip i denne sag, nemlig princippet om at Lagtinget skal informeres, er ikke blevet fulgt.*

*At der er sket et brud på proceduren, kan ikke bortforklares.*

*Mindretallet er dog glad for at kunne konstatere, at der blandt de fleste partier i Folketinget er en erkendelse af, at en gammel praksis er blevet brudt, og samtidig en forståelse for, at der fastlægges en fremtidig procedure, så lignende misforståelser og problemer undgås.*

*Det er også vigtigt at præcisere, at den militære straffelov ikke tvangsomfatter den almindelige befolkning, men alene dansk militær på Færøerne.*

*Ved 1. behandlingen af beslutningsforslaget har mindretallet fået tilkendegivelser fra dansk side, som har overbevist mindretallet om, at vi kan fortsætte samarbejdet i rigsfællesskabet med gensidig tillid og respekt.*

*Sambandspartiet har ikke ændret holdning siden den enstemmige vedtagelse i Lagtinget den 2. maj 2003 og af prinsipielle grunde, kan mindretallet derfor stemme for forslaget med ovenstående bemærkninger."*

Bert fáar atkvøður vóru fyri uppskotinum, sum sostatt er fallið, men grundgevingarnar frá danskari síðu vóru klárar og greiðar. Stjórnin harmaðist tó handfaringina og vildi virka fyri broyttum mannagongdum.

**Ríkisfelagsskapurin**
Vert er at nevna, at ríkisfelagsskapurin hevði góða undirtøku á fólkatingi, og at ongin ivi var um tað undir viðgerðini. Tí er nú at vóna, at okkara landsstýri eisini ger sítt til, at samskiftið millum londini bæði heldur fram við tí virðing og áliti, sum felagsskapurin eigur at fáa fyri at røkka bestu loysnunum.

# Rentan lækkar

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Sparikassi*

Føroya Sparikassi lækkar í morgin rentuna. Rentulækkingin er ein beinleiðis avleiðing av, at Europeiski Meginbankin og danski Tjóðbankin hava sett rentuna niður.

Rentubroytingin hjá Føroya Sparikassa verður galdandi frá í morgin, mikudegnum 11. juni 2003.

Sparikassin lækkar rentuna á innlánum við uppsøgn við 0,50% - 0,75% um árið. Rentan á innlánum uttan uppsøgn er óbroytt.

Útlánini lækka við upp til 0,75% p.a. Rentan á sethúsaláni, 1. veðrættur, verður 4,25 -4,50% um árið. Einstøk útlánsrentustig eru tó óbroytt.

Rentubroytingin er eitt úrslit av, at danski Tjóðbankin tann 7. mars 2003 lækkaði diskontuna við 0,25% p.a. og aftur tann 6. Juni við 0,50% p.a.

Høvuðsbroytingarnar eru at finna á uppslagi á deildum Føroya Sparikassa og á www.sparikassin.fo

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Kaos?

**Signar P. Heinesen**



Kaos er eitt hugtak, sum verður brúkt í ymsum sambandi, har talan onkursvegna er um eitthvørt óskipað ella tilvildarligt. Eitt dømi er læran um kaos, sum grein í matematik, har teldur verða settar at arbeiða við skipaðum spælireglum, men har endaligu úrslitini eru framkonin við ymsum tilvildarligum millumúrslitum innanfyri hesar spælireglur.

Í læruni um, hvussu vit røkka settum málum í einum umbroytiligum heimi - tað, sum á fremmandum máli nevnist "strategi" - verður hugtakið kaos eisini nýtt. Tað er ein støða, sum eitt virki, ein felagsskapur ella eitt heilt land kann koma í og sum er ring at koma burturúr. Støðan er kaotisk, tá ið fleiri týðandi partar hava ilt við at samansjóva ymisk áhugamál við lagaligum amboðum. Hugtakið "opið kríggj" verður eisini nýtt um hesa støðuna. Høvuðseyðkennini eru hørð kapping millum áhugamál og ongar spælireglur.

### Spælireglur ella ikki

Tann, sum fyrst og fremst hevur ábyrgdina fyri at spælireglur virka á flestu økjum bæði í sambandi við vinnuligt virksemi, alment virksemi og privat virksemi hjá borgaranum, er stjórnin. Alment er galdandi, at ovasta leiðslan hevur ikki bert ábyrgdina fyri at loysa stakar uppgávur, men ovasta leiðslan hevur eisini ábyrgdina fyri, at tað yvirhøvur ber til at loysa uppgávur.

Tær mest týðandi spælireglurnar koma vanliga ikki undir heitið "spælireglur", men eru lógir og kunngerðir, sum eru karmur um alt okkara virksemi. Tann atferðin, sum fær fólk við ymsum áhugamálum at samvirka í praksis kemur oftast undir heitið "spælireglur". At hendan atferð er innanfyri lógarinnar karmar er ein sjálvfylgja - helst væl innanfyri. Tá ið fólk fara út á kantin av lógini ella út á kantin av tí, sum vit meta vera góðan sið, rokna vit oftast við, at viðkomandi hevur brotið spælireglurnar.

At broyta spælireglur við lóg ber væl til og verður eisini vanliga gjørt. Tað ber eisini til at broyta spælireglur uttan at broyta lógir ella kunngerðir. Demokratiskt verða spælireglur broyttar við samrøðu. Tann, sum samrøður uttan at siga sum er ella hevur ósanna atferð, hevur ikki bert brotið eitt sett av spælireglum, men hevur skapt kaos í teim uppgávum viðkomandi hevur ábyrgd av. Afturat tí hevur tann ósanni meldað seg sjálvan úr felagsskapinum og einki grundarlag er fyri samskifti. Uppá sikt - og tað er ikki so lang tíð í hesum sambandi - kemur alt virksemi, sum liggur undir einum slíkum leiðara, í eina kaotiska støðu.

Virksemi, sum er í eini kaotiskari støðu, hevur ongan møguleika at røkka settum málum, sum sikta longur enn rakstur ella smávegis broytingar í arbeiðslagi. Virksemi, sum ikki hevur møguleika at røkka mennandi málum, er ikki burðardygt. Hetta hevur ta fylgju, at tað, sum "vit" gjørdu áðrenn støðan gjørdist kaotisk, annaðhvørt verður slept ella verður gjørt av øðrum meðan "vit" umsita tað.

### Kaos og strategisk kreppa

Fyri hvørt málsøki, sum fær kaotisk eyðkenni, verður strategiska støðan verri og verri. Møguleikarnir at røkka settum mennandi málum verða minni og minni. Eina strategiska kreppu hava vit, tá ið tað er at kalla ómøguligt at menna nakað virksemi av týdningi í landinum.

Høvuðseyðkennið við eini strategiskari kreppu er, at virksemi, sum vit gjørdu í gjár, ger onkur annar í dag uttan at vit brúka krefturnar til at menna virksemi, sum vit gera í dag, men onnur gjørdu í gjár.

Rækjuvinnan er nú eini 30 ára gomul og tíðin er komin at hon er í harðari kapping. Sama er galdandi fyri alivinnuna. Í einum strategiskt sunnum samfelag vilja slíkar vinnur umskipa seg og hóast færri fáa úrkomuna úr henni og helst eisini við minni vinningi, so verður tó rúm fyri nøkrum eindum í onkrum formi. Tær mennandi kreftirnar verða so nýttar til annað, nýtt virksemi.

Spurningurin, sum vit kunnu seta okkum, er so, hvar tær mennandi krefturnar virka í dag? Eru Føroyar strategiskt væl fyri, soleiðis at tær mennandi krefturnar í samfelagnum hava høvi at troyta nýggjar møguleikar og vinna á trupulleikum, sum gjørdi, at onnur ikki troyta júst hesar møguleikar?

Tann strategiska støðan kann ikki avlesast í bankabókini. Vit kunnu vera væl fyri peningaliga, men hava ómetaliga vánalig útlit strategiskt, eins væl og vit kunnu vera ómetaliga illa fyri peningaliga, men strategiskt væl fyri. Strategiskt eru vit væl fyri, tá ið fólk við initiativi fáa rásarúm.

### Krepputekin?

Eins og búskaparligar kreppur vísa síni tekin, so vísir strategiska kreppan eisini síni tekin. Mest týðandi teknið er, um vit ikki megna at vinna á nýggjum vinnuligum leiðum og samstundis lata onnur gera uppgávur, sum vit gjørdu í gjár. Kjakið um Elektron, um tunnilsgerð, havnagerð, skipabygging o.s.fr. eru dømi um virksemi, sum kann vigast á hesi vektini. Dømini við alivinnuni, rækjuvinnuni og pørtum av fiskivinnuni á nærleiðunum kunnu vigast á somu vekt.

Eitt annað tekin í sambandi við eina strategiska kreppu, har kaotisk støða er høvuðstrupulleikin, vísir seg í, hvussu strategiska orkan verður nýtt. Vit kenna hetta frá einaræðisharrum, sum brúka størsta partin av strategisku orkuni í landinum til at verja seg sjálvan. Í einum demokrati vísir hetta seg eitt sindur øðrvísi, men úrslitið er tað sama: strategiska orkan verður køvd, tí stórur partur av fólki við formligari ábyrgd, brúka strategisku orkuna til at verja seg sjálv. Vit kunnu siga, at strategiska orkan er sligin bakk - heldur enn at bróta út, vendir hon inneftir. Heldur enn at halda áfram, skoðar hon fortíðina. Fólk við initiativi verða køvd.

Eitt triðja tekin í sambandi við eina strategiska kreppu, har kaotisk støða er høvuðstrupulleikin, kann vísa seg í atferðini millum tað almenna og vinnuna. Tað kann vísa seg so ymiskt, men ein vandi kann vera, at "vinnan" sæð frá almennari síðu bert er tann gamla vinnan. Ein annar vandi av sama slag er, um tað almenna fer undir liberaliseringar, har tað eisini er "dómari" og í praksis ávirkar gongdina millum partarnar, sum skulu kappast. T.d. fyri at "prógva", at kappingin "virkar".

At enda í hesum sambandi er vert at nevna eitt tekin uppá kreppu, sum at kalla vísir seg undan eini hvørjari kreppu. Vanliga fólkið fær ein varhuga av, at hetta gongur ikki í longdini, men hevur av góðum grundum ofta ilt við at seta orð á hesa ívitan. Alt meðan lærd fólk í ovastu sessum landsins koma kropp á kroppi og royna at vissa fólkið um, at her gongur sum eftir ánni.

### Framtíðarútlit

Um vit eru á veg inn í eina strategiska kreppu ella vit longu eru í henni - ella vit als ikki eru ávegis eina slíka, kunnu fólk gera sær sínar metingar um. Fólk flest munnu tó vera á einum máli um, at eitthvørt er ikki heilt so gott, sum tað kundi verið.

Vit eru 48.000 fólk á hesum klettunum og tað er snøgt sagt ov lítið til at oyðsla við. Tað er reglan heldur enn undantakið, at fólk í týðandi uppgávum gevast á hondum. Onkur vísir til, at borðið fangar, annar vísir til lóg og landaskil, triði kann ikki taka eitt politiskt mál upp uttan at skýra onnur annaðhvørt misskiljingar ella lygnarar, fjóri fær týðandi partar av sínum starvsfólkum ímóti sær, fimti fær minsta smáting til politiskt stórmál, sætti kann ikki nerta eitt viðkvæmt mál uttan at velja síðu, sjeyndi hevur alment boðað frá, at hann bert vil samskifta innanfloks ella í samgongu og ikki í Tinginum o.s.fr. - alt meðan uppgávurnar liggja óloystar og gjáir víðka. Nógvir administratorar men eingin statsmaður. Nógvur sjónleikur men eingin samrøða. Í eini funktión fyri og aðrari eftir missir fólk stevið og hvør roynir at klára seg sjálvan sum frægast.

Undir slíkum umstøðum er trupult at fáa eitt mennandi umhvørvi. Undir slíkum umstøðum er skjótt, at fólk koma sær út í óføri við at svíkja álitið millum samstarvsfelagar o.o. Undir slíkum umstøðum er ikki løgið, at ongar gjøgnumførdar og týðandi vinnuligar nýskapanir verða framdar, alt meðan vit missa fleiri og fleiri funktiónir av hondum. Hetta er hent í tíðum, sum áttu at verið góðar til mennandi virksemi og har umstøðurnar kring okkum eisini hava verið lagaligar. Hetta er hent í tíðum, har kravið til menning er størri enn nakrantíð fyrr.

Eg haldi meg síggja týðulig tekin um eina strategiska kreppu. Serliga tvey viðurskifti gera seg galdandi. Annað er, at vit dag undan degi missa vinnuligt landaøki uttan at vinna onnur øki inn aftur. Hitt er, at fyri mær sær tað út til, at fyri tann, sum situr í ábyrgdarstarvi, er tað ein tryggur arbeiðsháttur at skáka sær undan uppgávuni og koma við ymsum fjákalótum til undanførslu, meðan alt fleiri í ábyrgdarstørvum koma sær í óføri, tí tey í bestu sannføring royna at loysa uppgávur, hóast truplar umstøður. Um hesar metingar eru á leið, so er tað ein týðulig ábending um, at vit hava eitt "initiativkøvandi" umhvørvi. "Grátikonan" fær rásarúm, meðan "Konubrotið" verður køvt.

Hóast hetta eri eg ikki ein teirra, sum haldi, at vit eru í eini strategiskari kreppu. Enn. Eg eri heldur ikki ein teirra, sum haldi at eitt stjórnarskifti - í sær sjálvum - loysir nakran trupulleika. Um tað hinvegin er neyðugt fyri at blanda blóð av nýggjum er so nakað annað. Fyri mær at síggja er tað ein spurningur um at taka seg saman - at síggja veruleikan og taka avleiðingarnar. Ein góð byrjan kann vera at telja til 48.000 og taka avleiðingarnar av hesum tali. Ein onnur brúkilig byrjan var eisini at umhugsa munin millum grundsjónarmiðini aftan fyri maktlæruna og leiðslulæruna og taka avleiðingarnar av hesi umhugsan. Lyfta vit lokið av tí initiativkøvandi virkseminum, tá hava Føroyar allar møguleikar fyri at spretta á mongum økjum. Eisini hóast ymisk tekin í sól og mána kanska sýnast heldur døkk fyri tíðina - tíbetur eru eisini onnur tekin á himmalhválvinum og tey tekna eitt sindur betur. Initiativ hava vit okkara ríkiliga part av - spurningurin er, hvussu vit brúka orkuna til at stuðla initiativi heldur enn at køva tað.

So kunnu vit sjálvandi kjakast leingi um tað er samgongupolitikarin, andstøðupolitikarin ella tað er tann einstaki, sum skal taka seg saman.

# Veittur stuðul úr Grunninum Nuuk-Reykjavík-Tórshavn

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar býráð*

Í ár vóru dkr. 290.000,- veittar umsøkjarum, sum søktu fíggjarligan styrk til tiltøk ella starvsemi, ið kunnu menna samstarvið millum kommunurnar.

Á stýrisfundi í Reykjavík, tann 6. juni í ár, viðgjørdu stýrislimirnir úr Nuuk, Reykjavík og Tórshavn tær 26 umsóknirnar, ið inn vóru komnar, og samtyktu at veita hesum 8 studning:

Dansifelagið í Havn fekk 25.000 dkrónur til dansiferð til Reykjavíkar.

Hornorkestur Frelsunarhersins úr Tórshavn fekk 35.000 dkrónur til konsertarbeiði við tónleikarum úr Tórshavn og Reykjavík.

Bragdið úr Tórshavn fekk 15.000 dkrónur til at fyrireika Tórshavnar Marathon í samstarvi við Reykjavíkar Marathon.

KaSa ensemblið úr Reykjavík fekk 60.000 dkrónur til eina verkætlan, sum nevnist „Framtíðar kamartónleikur". Ætlanin er m.a. at bjóða ungum tónleikarum millum 8 og 20 ár til kapping. Vinnararnir luttaka í trimum kamarmusikkweekendum, einari í hvøjum býi.

Birgitta Spurn úr Reykjavík fekk 30.000 dkrónur til grønlendska framsýning, sum skal vísast í Reykjavík, Tórshavn og Nuuk.

Rut Ingólfsdóttir úr Reykjavík fekk 25.000 dkrónur til konsert tourne í Tórshavn og Nuuk.

Katuaq í Nuuk fekk 50.000 dkrónur til konsert tourne í Reykjavík og Tórshavn. Eitt av endamálunum við ferðunum er at skifta gávuríkar tónleikarar millum býirnar.

Pele Møller Band úr Nuuk fekk 50.000 dkrónur til Jazz festival í Tórshavn.